

Mynd: centrica.com

# Faroe Petroleum við í milliardaíløgu í Norðsjónum

**Jógvan Hugo Gardar**

26.10.2014 - 12:22

Oljan.fo

Fyrr í ár boraðið Centrica tveir avmarkingarbrunnar í samband við Butch-brunnin í norska partinum av Norðsjónum. Úrslitið boringini var skuffandi, og fleiri mettu at hetta merkti at brunnurin ikki vildi verða útbygdur nú.

Faroe Petroleum eigur 15 prosent í hesum loyvinum.

Mú eru boð komin frá Centrica, ið er fyristøðufelag, at tey nú í staðin fyri at steðga á, seta nógv fyri og vilja hava brunnin í framleiðslu longu í 2018 ella 2019. Talan verður um eina íløgu uppá millum 3,6 og 7,2 milliardir danskar krónur. Av hesum kemur Faroe Petroleum at standa fyri einastaðni millum 540 milliónir krónur og 1,1 milliard.

Stóri prísmunurin kemur av fýra ymiskum loysnum fyri at fáa fatur á oljuni. Henning Eide, ið stendur´á odda fyri Butch-ætlnanini hjá Centrica, sigur við offshore.no at allar fýra loysnirnar lata seg gera tøkniliga, og at ongin í dag tykist meir brúkilig enn ein onnur. Talan er fyrst og fremst um ymiskan prís og ymiskar loysnir.

Sum skilst umhugsa teir bæði vanligar boripallar og flótandi boripallar.

Metingarnar siga at tað eru millum 27 og 51 milliónir føt oljulíkar í brunninum, ið liggur sunnarlaga í norska partinum av Norðsjónum, ikki langt frá Ula- og Gyda-brunnunum.

Eide sigur at tey ikki umhugsa fleiri boringar, men at byggja út økið við tí kunnleikanum tey hava um brunnin.

Feløgini sum eru við í hesum loyvinum eru Centrica, Suncor, Tullow og Faroe Petroleum. Ætkanin er at tey í februar 2016 hava eina ætlan klára til útbygginga, og at framleiðslan byrjar í 2018 ella 2019.